Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

# BÚSKAPARFRØÐINGUR Á HAGSTOVUNA

## HAGSTOVAN SØKIR EFTIR EINUM BÚSKAPARFRØÐINGI TIL AT STANDA FYRI HAGTØLUNUM UM GJALDSJAVNA OG UTTANLANDSSKULD.

**Ábyrgd**
Búskaparfrøðingarnir á Hagstovuni eru eitt toymi, sum arbeiðir tætt saman í felags arbeiðsætlan, har hvør einstakur kortini hevur sínar ábyrgdir.
Uppgávan er at vera partur av toyminum um tjóðarroknskapin, at hava ábyrgdina av uppgerðunum av gjaldsjavna og uttanlandaskuld, at stíla fyri innsavningini og viðgerðini av upplýsingum, at fremja uppgerðina sambært altjóða forskriftum og at kunngera úrslitini.

**Førleikar**
Vit sóknast tí eftir einum akademiskt útbúnum búskaparfrøðingi, við áhuga fyri tjóðarbúskapi og hagtølum sum heild. Uppgávan krevur góðan kunnleika til vinnuligu viðurskiftini í landinum og samstundis krevjast góðir førleikar til hagtalsliga viðgerð av innheintaðum upplýsingum.

Haraftrat vænta vit, at tú hevur royndir av fakligum analytiskum arbeiði, sum seta teg føran fyri at geva sjálvstøðugt íkast til menningina av týðandi informasjón um samfelagsbúskapin. Vit vænta eisini, at tú hevur evnini at gera torfør mál einføld hjá øðrum at skilja, so at tú lættliga kannst samstarva við tøknideildina, samstarvs-felagar annars og eisini dugir at greiða frá fløktum viðurskiftum á ein lættfatiligan hátt.

Góð samstarvsevni og ein positivan hugburð til uppgávuna leggja vit stóran dent á. Á Hagstovuni telja fólk, men fyri okkum eru tað fólkini ið telja.

**Starvið**
Starvið er fultrúastarv á Hagstovuni og verður samsýnt við løn sambært galdandi sáttmála millum Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og Landsstýrið.

Umsóknarfreistin er 15. mei 2005, tá skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi. Vilt tú vita meira um starv, treytir og arbeiðspláss, ring so til Hermann Oskarsson ella John Jacobsen á telefon 35 28 00.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

Lesið Sosialin -so eru tit við!



# 2 STARVSFÓLK TIL SØLUDEILDINA

## Vilt tú vera við til at selja Føroyar um allan knøttin?

**Starvið**
Spennandi sølustarv í altjóða umhvørvi, har tú sleppur at royna teg innan sølu til bæði einstaklingar og bólkar, føroyingar og útlendingar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið FHS ella Miðmámsprógv.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur við at arbeiða við teldu.

Umsøkjarar skulu vera fyrikomandi, ágrýtnir og førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

Royndir innan sølu og ferðavinnu er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært sáttmála.

**Umsóknir**
Umsóknir við møguligum prógvum skulu sendast til:

Smyril Line
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Att: Svein í Heiðunum

Ella við telduposti til:

sih@smyril-line.fo

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 10. mai 2006, innan kl. 12:00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Svein í Heiðunum á tlf. 34 59 00.

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM